## Kappingarneytar samstarva

Stóru bilverksmiðjurnar og kappingarneytarnir í USA, General Motors og Ford Motor Company, arbeiða við ætlanum um at gera felags motorar fyri at spara framleiðsluútreiðslur. Tað skrivar The Detroit News, sum sitarar fleiri høgtstandandi leiðarar frá báðum verksmiðjunum. Hugskotið til motorsamstarvið kom frá General Motors, og Ford leiðslan hevur sýnt áhuga fyri samatarvinum á fyrstu fundunum, sum hava verið millum verksmiðjurnar báðar. Enn er tó eingin avgerð tikin, skrivar The Detroit News.

# Fólk eru fegin um loysnina

**- Vit hava gingið og bíðað í fleiri mánaðir uttan at vitað, hvat fór at henda. Í ringasta føri kundi tað hent, at alt virksemið steðgaði upp, meðan roynt varð at finna eina loysn. Nú viðurskiftini eftir øllum at døma eru komin í eina tryggari legu, sum gevur fyritøkuni nýggjar møguleikar og størri fíggjarligt rásarúm, eru vit ógvuliga fegin, sigur Harry Johannesen, sum starvast hjá Faroe Seafood á Toftum**

FISKAVIRKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Harry Johannesen sigur, at fólk, sum eru í starvi hjá Faroe Seafood, í langa tíð ikki hava vitað, hvat fór at henda við teirra arbeiðsplássi.

- Vit hava snøgt sagt ikki vitað, um vit eru keypt ella seld. Eingin fiskur er keyptur uttan veiðan hjá skipunum, sum hava tilknýti til felagið. Her hevur verið lítið fiskaarbeiði og fólk, sum hava vitað sær okkurt annað, eru farin – eisini fólk, sum í nógv ár hava arbeitt á fiskavirkinum.

Faroe Seafood á Toftum er saltfiskavirki burtur av, sum eitt nú virkar tosk og longu, og tá felagið ikki hevur keypt fisk frá øðrum skipum enn sínum egnu, hevur grundarlagið undir teirri framleiðslu, sum verið hevur, verið hjáveiða hjá trolarunum.

- Tey, sum skera, salta og pakka, hava havt ógvuliga lítið at gera, og í langa tíð hevur talan bert verið um ein og tveir dagar um vikuna.

Harry, sum sjálvur koyrir truck á virkinum, hevur tó havt eitt hampiligt tímatal – eisini í hesi tíðini, nú lítið og einki virksemi hevur verið.

- Tá alt var, sum tað plagdi, vóru vit eini 50 fólk á virkinum tilsamans. Men nú í langa tíð hevur verið rættiliga tómligt á kaffistovuni í matarsteðgum. Tá arbeiði hevur verið, hava vit kanska verið eini 15 fólk.

Hann sigur, at tá so lítið fiskaarbeiði hevur verið, hevur leiðslan brúkt tey somu fólkini til ymiskar uppgávur, eitt nú skering, salting og pakking, og tí hevur samlaða talið av arbeiðsfólki verið so lítið.




*- Vit vóna, at nevnd og leiðsla veruliga fara at hava fingurin á pulsinum, so loysnin kann gerast varandi og tryggja framtíðina hjá fyritøkuni og teimum fólkum, sum eru grundarlagið undir virkseminum hjá Faroe Seafood, sigur Harry Johannesen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*- Vit fingu nógvan fisk í gjár, serliga línufisk undan Íslandi. Nógv var at skera, men í dag hava vit so bara tað eftir, sum leyp av frá degnum í gjár. Eg veit ikki, hvat er á marknaðinum í morgun, men nú vóna vit, at arbeiðsdagarnir í framleiðsluni verða nógv fleiri, enn teir hava verið seinastu mánaðirnar, sigur Harry Johannesen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Merkt støðuna

- Jú, vit hava væl og virðiliga merkt, at fíggjarliga støðan hevur verið alt annað enn góð hjá felagnum í hesi tíðini. Hetta hevur verið ein trupul tíð við stórari óvissu um framtíðina. Vit hava einki fingið at vita, og tí hava gitingarnar eisini verið nógvar. Øll hava gingið og bíðað og vónað.

Harry sigur, at tað var klokkan hálvum tíggju í gjáramorgunin, at arbeiðsfólkið á Faroe Seafoood á Toftum fekk kunningina, sum tey so leingi hava bíðað eftir.

- Tað var stjórin hjá okkum, sum eisini er stjóri á virkinum í Saltangará, Erland Johansen, sum kunnaði okkum um framtíðina. Fólk vóru fegin, og síðan kunningina í gjár, hevur lagið á fólki verið gott.

Hann sigur, at í ringasta føri stúrdu fólk fyri, at alt virksemið hjá felagnum fór at steðga upp, meðan roynt varð at finna eina loysn.

- Men nú viðurskiftini eftir øllum at døma eru fingin í eina tryggari legu, sum gevur fyritøkuni nýggjar møguleikar og størri fíggjarligt rásarúm, eru vit ógvuliga fegin.

### Kostað pening

Harry sigur seg væl skilja, at tað má hava kostað felagnum dýrt, at fíggjarligu karmarnir hava verið so trongir í langa tíð.

- Tú kanst ikki fáa lønandi virksemi við at skera fisk í nakrar heilt fáar tímar um vikuna og síðan brúka nógvan pening upp á at vaska alt virkið aftur um náttina. Í aðrar mátar hevur eitt virkið, sum lítlan og ongan fisk keypir og framleiðir, heldur